# 800 metrar inni í Háfjalli

**Knappar 800 metrar inni í Háfjalli verður borað dúgliga, og trygdin er í hásætinum, meðan arbeiðsliðið hjá Føroya Konsortium arbeiðir við at knýta Klaksvík fasta við restina av meginlandinum**

NORÐOYATUNNILIN

*Myndir: Álvur Haraldsen*
*Tekstur: Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



**Inni í Háfjalli:**
Uppi við Borðoyavík heldur Føroya Konsortium til, meðan arbeiðið upp á norðoyatunnilin fer fram. Inni í einum av skúrunum standa arbeiðsformaðurin Kári Johansen og verkætlanarleiðarin, Svein Christiansen. Teir geva sær góðar stundir til prát og eru sera fyrikomandi. Teir bjóða eisini ein túr inn í tunnilin at hyggja at arbeiðinum.

*Nær spreingja tit aftur?*

– Um smáar fimm minuttir, sigur Svein skemtandi, meðan hann koyrir spakuliga inn í tunnilin, sum fer at kollvelta alt samband millum Klaksvík og meginlandið.

Teir greiða frá, at teir spreingja í meðal tvær og eina hálva ferð um samdøgurið.

Knappar 800 metrar inni í fjallinum stendur ein stór maskina og borar lítil hol í tunnilsveggin. Borað verður einar 38 metrar inn fyri at vita, um vatn liggur í møguligum rivum í tunnilsvegginum. Nógv vatn verður nýtt til at køla borarnar niður, meðan borað verður. Ein maður situr í maskinuni og stýrir borunum. Vatnið rennur niður eftir vegginum og stórir hyljar eru at síggja á vegnum. Alt hetta vatnið verður tó pumpað út úr tunlinum og oman í bátahylin.

## Vánaligur vegur

Tað kennist næstan sum at ganga úti í einum grovum regnæli, hóast ein er staddur so langt inni í einum fjalli. Tað dryppar undan loftinum allastaðni. Men kortini, siga menn, at tað er ikki nógv vatn í Norðoyatunlinum, Borðoyarmegin.

Vegurin er í ófantaligum standi, so meðan ein stendur og eygleiðir arbeiðið, kann tað vera torført at ímynda sær, at um tvey ár ella kanska minni, fer øll ferðsla úr norðoyggjum til meginlandið at ganga ígjøgnum tunnilin. Men vegurin verður ikki í so ringum standi longi afturat. Nú eru teir komnir so mikið áleiðis við tunlinum, at teir skjótt fara at byrja at asfaltera koyribreytina inni í tunlinum.

– Tað verður betur fyri bilarnar, og alt fer at ganga smidligari, ongin ivi um tað, sigur Kári Johansen, arbeiðsformaður.

Gangurin inni í tunlinum er øgiligur, og lukturin av eyri, moldi og maskinum setur seg í nasaborarnar.



*Knívskorin linja sást, har sum Klaksvíkslindin skilir seg frá tí næstu fláini*



*Hendan maskinan verður nýtt til eftirtrygging av tunlinum, tá eitt ávíst tal av metrum eru boraðir. Her verður loftið boltað*

*Ein maður situr í maskinuni, sum stýrir øllum boriarbeiðinum í Norðoyatunlinum. Alt verður stýrt úr hesi maskinuni*

Framhald á síðu 16



*Gangurin er øgiligur inni í tunlinum, meðan maskinan borar, so menn mugu rópa í oyruni á hvørjum øðrum*

